#

# Landsroyndin 2010

## Frágreiðing um mál, ávegis mál, uppgávur og úrslit

Mentamálaráðið

November 2010

# Landsroyndin 2010

## Almennar viðmerkingar

Sambært § 14, stk. 5 í løgtingslóg um fólkaskúlan skipar landsstýrismaðurin, eftir nærri ásettum reglum, fyri landsroynd í føroyskum, støddfrøði og náttúrulærugreinunum á 4. og 6. floks stigi. Landsroyndirnar skulu saman við støðuroyndum vera ein liður í arbeiði skúlans at eftirmeta undirvísingina. Í lógini er eisini ásett, at foreldrini skulu verða kunnað um úrslitini av lands- og støðuroyndum.

## Endamál

Endamálið við lands- og støðuroyndunum er at tryggja skúlum, foreldrum, næmingum, lærarum og myndugleikum innlit í fakliga støðið í fólkaskúlanum. Eisini at geva lærarum og skúlaleiðslu eitt amboð, sum, umframt at meta um fakliga støðið hjá næmingunum, eisini skal nýtast til at laga og málrætta undirvísingina til tørv og fortreytir hjá tí einstaka næminginum. Málið við lands- og støðuroyndum er at styrkja eftirmetingarskipanina í skúlunum.

Harumframt eru landsroyndirnar ætlaðar sum amboð og ítøkiligt grundarlag hjá myndugleikum, skúlum og foreldrum at fylgja við og meta um fakliga støðið í teirra egna skúla, umframt at kunna viðgera úrslitið í mun til fakliga støðið í øðrum skúlum í landinum.

## Eftirmeting av landsroyndini 2009

Í sambandi við landsroyndina í 2009 varð lógarbroyting gjørd, sum ásetur, at skúlaleiðarin saman við einstøku lærarunum skal viðgera úrslitini frá landsroyndini og leggja eina ætlan fyri, hvussu møguligar neyðugar ábøtur skulu fremjast. Skúlaleiðarin skal í seinasta lagi 3 mánaðir eftir, at skúlin hevur fingið úrslitini, senda Mentamálaráðnum eina frágreiðing um, hvørji tiltøk og ætlanir úrslitini hava elvt til.

Frágreiðingarnar frá skúlunum viðvíkjandi landsroyndunum í 2009 vísa, at landsroyndarúrslitini verða nýtt til at betra um innihald og háttalag í undirvísingini, umframt sum tilelving at gera undirvísingina meira fjøltáttaða. Harumframt hava fleiri skúlar greitt frá, at teir hava sett í verk ymisk menningarátøk at bøta um undirvísingardygdina. Sum dømi kunnu nevnast lesi-, skrivi- og rokniátøk. Einstakir skúlar hava greitt frá, at regluligar støðuroyndir verða gjørdar í lærugreinunum til tess at meta um úrtøku næminganna, og við støði í støðuroyndunum hevur skúlin tillagað undirvísingina í mun til fortreytirnar hjá tí einstaka næminginum.

## Um landsroyndina 2010

Í ár er tað á triðja sinni, at skipað verður fyri landsroynd í 4. og 6. flokkunum í fólkaskúlanum. Fyrsta landsroyndin varð framd í 2008, og við støði í eftirmetingini av landsroyndini í 2008 vóru ávísar broytingar og tillagingar gjørdar í sjálvum royndunum í 2009. Royndirnar í 2010 eru skipaðar eftir sama leisti sum í 2009.

Landsroyndirnar í 2008 og 2009 vóru í apríl mánað. Hetta var mett at vera óheppið, tí skúlaárið var so langt liðið, og tíðin var ov knøpp til, at royndarúrslitini kundu verða send skúlunum, áðrenn skúlaárið endaði. Grundað á hetta er royndartíðarskeiðið flutt, og var landsroyndin í 2010 í mars mánaði. Royndarúrslitini vórðu send skúlunum í viku 21.

Uppgávurnar til landsroyndina eru gjørdar við støði í *ávegis málum* fyri lærugreinirnar í 4. og 6. flokki. Málini fyri lærugreinirnar eru tey somu sum árini frammanundan, og tí verður mett, at lærarar og næmingar hava innlit í málini og krøvini til landsroyndina.

Við atliti at, at landsroynd nú á triðja sinni er skipað í fólkaskúlanum, verður eisini mett, at bæði lærarar og næmingar hava vant seg við landsroyndina sum eftirmetingarhátt. Næmingarnir í 6. flokki hava verið til landsroynd í 2008, tá teir gingu í 4. flokki. Hetta er sostatt fyrstu ferð, at ein árgangur hevur ítøkiligar royndir í at vera til landsroynd.

## Úrslit

Tað er týdningarmikið at leggja dent á, at slíkar royndir sum landsroyndin langt frá siga alt um førleika næminganna. Men royndirnar kunnu tó geva eina ábending um, hvussu støðan er. Úrslitið skal nýtast sum partur av samlaðu eftirmetingini hjá skúlunum við atliti at innihaldi, háttalagi o.ø. til tess at betra um undirvísingardygdina og úrtøkuna hjá næmingunum.

Ein samanbering millum úrslit í royndum sum hesari, eigur altíð at verða gjørd við størsta fyrivarni, ment tá ið hetta kortini verður gjørt, eru tað nógv ymisk viðurskifti, sum atlit skulu takast til. Tað eru ymiskir næmingar, sum hava tikið lut í royndunum, ymiskir lærarar, sum hava havt undirvísingina um hendi, umframt at innihaldið í uppgávunum er tillagað og broytt.

Niðan fyri verður greitt frá málum, uppgávum og úrslitum í einstøku lærugreinunum. Ætlanin er, at nýggjar námsætlanir verða settar í gildi frá 1. august 2011. Hetta merkir, at skúlaárið 2011/2012 verða førleikamálini á ymsu floksstigunum orðað av nýggjum. Hetta fer uttan iva at ávirka landsroyndirnar í 2012.

# Føroyskt

Endamálið fyri lærugreinina
Undirvísingin í lærugreinini hevur til endamáls:

- at næmingurin fær tokka til móðurmálið
- at næmingurin fær áhuga og virðing fyri móðurmálinum
- at næmingurin lærir, at móðurmálið er samskiftismiðil millum menniskju
- at næmingurin lærir at málbera seg væl og vakurt
- at næmingurin lærir at lurta og lesa, so hann verður førur fyri at fata og sjálvur nýta ein beinraknan og skiftandi málburð
- at næmingurin lærir at skriva føroyskt málsliga og stavsetingarliga rætt og við rættari teknseting
- at undirvísingin er skipað soleiðis, at næmingurin fær stimbrað lesingina og ognað sær tey virði, sum eru í skaldskapi

## Ávegis mál í 4. flokki

Undirvísingin í 1.-3. flokki skal miða ímóti, at næmingurin stig fyri stig fær ognað sær kunnleika og fimi, sum ger hann føran fyri:

- at lesa og skriva sítt egna navn
- at kenna lesirætningin (at lisið verður frá vinstru til høgru og úr erva og niðureftir, og at næmingurin dugir at skifta reglu)
- at skilja, at til hvønn bókstavin knýta seg ljóð
- at kenna ávísar orðamyndir
- at brúka tey orðini, hann kennir, til at gitalesa nýggj orð
- at brúka bókstavirnar til at lesa orð, t.d. kann fyrsti bókstavurin í orðinum geva eina ábending um, hvat orðið er
- at lesa léttan tekst við kendum innihaldi – skilja einføld skrivlig boð
- at lesa og skriva í staðin fyri at tosa og lurta
- at ljóðlesa longri og longri orð
- at lesa ókend orð við at brúka sínar royndir, sína vitan og fatan
- at lesa léttar tekstir við hjálp av myndum til tess at kenna innihaldið
- at lesa stuttar setningar við kendum innihaldi uttan at vera bundin at myndum

Í 4. flokki eigur næmingurin at duga so mikið væl at lesa, at hann sjálvur kann lesa léttar bøkur á móðurmálinum, og næmingurin eigur at duga at skriva stuttar fyrisagnir og sjálvstøðugar søgur.

## Ávegis mál í 6. flokki

Í 6. flokki eigur næmingurin nú at duga so mikið væl at lesa, at hann sjálvur kann lesa torførar bøkur.

Umframt málini, ið eru nevnd omanfyri, eigur næmingurin í 6. flokki at verða førur fyri:

- at leita eftir upplýsingum
- at skilja og tulka tekstir
- at meta um innihaldið í tekstum
- at lesa meira flótandi, hóast enn kunnu vera orð, ið geva trupulleikar
- at finna svar út frá givnum teksti
- at lesa raðið og skilja tað, hann lesur
- at lesa og skilja eina leiðbeining í fleiri punktum, t.d. eina uppskrift
- at finna gleði við at lesa

## Uppgávurnar í føroyskum

Landsroyndin í føroyskum í 4. flokki fevndi um eina lesiroynd, *lesa og skilja.* Uppgávan var at lesa orð, setningar og styttri søgubrot, og við støði í lisna tekstinum skuldu næmingarnir svara spurningum. Skrivligi parturin var ein innsetingarfyrisøgn. Væntast má, at næmingurin dugir so mikið av málløru, sum neyðugt er til rættskrivingina á hesum stigi.

Landsroyndin í føroyskum í 6. flokki fevndi um eina lesiroynd, málløruuppgávu og fyrisøgn. Í lesiroyndini skuldi næmingurin lesa styttri og longri tekstir við tilhoyrandi skrivligum spurningum, sum skuldu svarast. Skrivligi parturin fevndi um eina roynd í málløru og eina innsetingarfyrisøgn.

# Roynadarúrslit

## 4. flokkur

*Talva 1*
### Fyrisøgn 4. flokkur

| | 2008 | 2009 | 2010 |
|---|---|---|---|
| ikki nøktandi | 31 | 21 | 29 |
| undir miðal | 33 | 70 | 35 |
| miðal | 61 | 107 | 82 |
| yvir miðal | 69 | 167 | 89 |
| gott | 124 | 144 | 156 |
| sera gott | 364 | 159 | 247 |
| *tils.* | *682* | *668* | *638* |

***Talva 1***

Næmingatal **4. flokkur fyrisøgn**




*Talva 1* vísir, at næmingarnir í 4. flokki sum heild hava kláráð fyrisøgnina væl. Úrslitið vísir, at 88% av næmingunum liggja frá miðal og uppeftir (í 2009 var hesin parturin 63% og í 2008 37%). 10% av næmingunum liggja í bólkinum undir miðal. Í 2009 var hesin parturin 13%.

# Lesa og skilja 4. flokkur

| | 2008 | 2009 | 2010 |
|---|---|---|---|
| krevur bata | 75 | | |
| ikki nøktandi | 36 | 44 | 139 |
| undir miðal | 65 | 66 | 67 |
| Miðal | 62 | 81 | 91 |
| yvir miðal | 129 | 196 | 85 |
| Gott | 158 | 183 | 137 |
| sera gott | 156 | 101 | 118 |
| *tils.* | *681* | *671* | *637* |

***Talva 2***

Næmingatal **4. flokkur lesa og skilja**




Úrslitið í *talvu 2* vísir, at 67% av næmingunum liggja frá miðal og uppeftir (84% í 2009 og 74% í 2008) og 33% liggja undir miðal (16% í 2009 og 26% í 2008). Talið av næmingum, sum liggja undir miðal, er økt við 7% í mun til 2009.

# 6. flokkur

## 6. flokkur fyrisøgn

| | 2008 | 2009 | 2010 |
|---|---|---|---|
| ikki nøktandi | 11 | 8 | 1 |
| undir miðal | 27 | 17 | 25 |
| miðal | 78 | 46 | 63 |
| yvir miðal | 99 | 153 | 146 |
| gott | 228 | 254 | 208 |
| sera gott | 234 | 249 | 252 |
| | *677* | *727* | *695* |

***Talva 3***




Sambært *talvu 3* sæst, at næmingarnir í 6. flokki hava klárað fyrisøgnina væl. Úrslitið vísir, at 96% av næmingunum liggja frá miðal og uppeftir (97% í 2009 og 94% í 2008), meðan 4% av næmingunum liggja undir miðal (3% í 2009 og 6% í 2008), sum er nakað betri enn í 2009.

# 6. flokkur lesa og skilja

| | 2008 | 2009 | 2010 |
|---|---|---|---|
| krevur bata | 61 | | |
| ikki nøktandi | 40 | 30 | 30 |
| undir miðal | 47 | 25 | 36 |
| miðal | 70 | 48 | 111 |
| yvir miðal | 127 | 100 | 134 |
| gott | 157 | 253 | 194 |
| sera gott | 154 | 270 | 189 |
| | *595* | *726* | *694* |

***Talva 4***




*Talva 4* vísir, at talið av næmingum, sum liggja frá miðal og uppeftir, er minkað í mun til 2009. 90% av næmingunum liggja frá miðal og uppeftir (93% í 2009 og 78% í 2008), og góð 10% liggja undir miðal (7% í 2009 og 26% í 2008).

# Málléra 6. flokkur

| | 2008 | 2009 | 2010 |
|---|---|---|---|
| ikki nøktandi | 52 | 15 | 8 |
| undir miðal | 116 | 54 | 48 |
| miðal | 198 | 86 | 111 |
| yvir miðal | 131 | 232 | 197 |
| gott | 118 | 175 | 158 |
| sera gott | 61 | 163 | 173 |
| | *676* | *725* | *695* |

***Talva 5***




*Talva 5* vísir, at næmingarnir í 6. flokki kláraðu seg væl í málléruuppgávuni.
92% av næmingunum liggja frá miðal og uppeftir (90% í 2009 og 75% í 2008), meðan 8% liggja undir miðal (10% í 2009 og 25% í 2008).

## Viðmerkingar til føroyskt

Úrslitið í landsroyndini vísir, at næmingarnir, bæði í 4. og 6. flokki, sum heild, hava klárað fyrisøgnina væl. Í 4. flokki liggja 88% av næmingunum í bólkinum miðal og uppeftir, umframt at talið av næmingum, ið hava fingið skoðsmálið *sera gott,* er økt í mun til árini frammanundan. Talið av næmingum, ið liggja frá miðal og niðureftir, er støðugt lækkað øll trý árini, skipað hevur verið fyri landsroynd. Í 6. flokki er úrslitið í fyrisøgn tó eitt vet verri enn í 2009. Talið av næmingum, sum hava fingið skoðsmálini *yvir miðal* og *gott,* er lækkað í mun til í 2009, meðan eitt vet færri næmingar liggja frá *miðal* og *niðureftir*.

Fyrisøgnin í 4. og 6. flokki var eins og árini frammundan ein innsetingarfyrisøgn. Metast má, at lærarar og næmingar hava lagt seg eftir at venja hetta háttalagið í sambandi undirvísingina í rættskriving. Neyðugt verður tó framhaldandi at leggja stóra áherðslu á rættskrivingar- og málllærupartin í føroyskum, soleiðis at næmingarnir í lærutilgongdini í føroyskum, eins og í øllum øðrum lærugreinum, leggja seg eftir at skriva rætt og nýta góðan málburð í tali og skrift.

Úrslitið í uppgávuni *lesa og skilja* vísir, at næmingarnir bæði í 6. og í 4. flokki hava klárað lesiuppgávuna nakað verri enn næmingarnir í 2009. Í 4. flokki vísir úrslitið, at 33% av næmingunum hava fingið skoðsmálið *undir miðal* og *ikki nøktandi*. Hetta er ein munandi øking samanborið við 2009. Talið av næmingum, sum fáa skoðsmálið *sera gott*, er tó økt nakað í mun til 2009.

Í 6. flokki er úrslitið í uppgávuni *lesa og skilja* munandi verri enn í 2009, serliga er talið av næmingum, sum liggja frá *yvir miðal* og *uppeftir* lækkað. 27% av næmingunum hava í 2010 fingið skoðsmálini *sera gott* í mun til úrslitið í 2009, tá ið 38% av næmingunum fingu *sera gott*. Talið av næmingum, sum hava fingið skoðsmálið *miðal* er tó økt við 9% í mun til 2009. Heildarúrslitið í 6. flokki vísir eina afturgongd í lesiførleikanum hjá teimum stinnaru næmingunum, men eina framgongd í lesiførleikanum hjá teimum veikaru næmingunum í mun til 2009.

Ein orsøk til hetta úrslit er, at uppgávan at *lesa og skilja* bæði í 4. og 6. flokki í 2010 er nakað øðrvísi enn samsvarandi uppgáva í 2009. M.a. eru fleiri og longri tekstir at lesa. Fyri at kunna lesa og svara spurningunum, mugu næmingarnir lesa raðið og hava nomið sær góðan lesiskjótleika. At 33% av næmingunum í 4. flokki í partinum at lesa og skilja hava fingið skoðsmálið *undir miðal* og *ikki nøktandi* bendir á, at avbjóðingarnar í uppgávuni kunnu hava verið ov krevjandi og stórar fyri henda aldursbólkin. Hinvegin er talið av næmingum, sum hava fingið skoðsmálið *sera gott*, økt í mun til 2009, og bendir hetta hinvegin á, at teir lesisterku næmingarnir hava megnað uppgávuna til fulnar, og hjá teimum hevur uppgávan tí ikki verið ov krevjandi. Minkingin í næmingatalinum í 6. flokki, sum hava fingið skoðsmálið *sera gott* og *gott,* er lækkað úr 38% í 2009 niður í 27% í 2010, og bendir hetta á, at uppgávan kann hava verið ov torfør hjá teimum stinnaru næmingunum.

Úrslitið í málllæru í 2010 vísir, at 92% av næmingunum í 6. flokki liggja í bólkinum frá *miðal og uppeftir* og 8% liggja frá *miðal og niðureftir*. Uppgávuvavið og royndartíðin var tann sama sum í 2009. Úrslitið má metast at verða sera gott og bendir á, at næmingarnar duga at loysa málllæruuppgávurnar og hava skilt og duga at nýta

mállærureglurnar. Neyðugt verður tó framhaldandi at menna mállærupartin í undirvísingini í føroyskum, soleiðis at næmingar ogna sær skil og fimi at nýta mállærureglurnar sum natúrligur liður í at orða seg bæði í skrift og talu.

Tað er ein neyðug og grundleggjandi fortreyt fyri framhaldandi læru og menningartilgongd hjá næmingunum, at teir duga at lesa, skriva og orða seg á móðurmálinum. Ikki minst í vitanarsamfelagnum, sum vit liva í í dag, er tað at duga at lesa, skilja og skriva alneyðugir førleikar til tess at kunna samskifta og klára seg í samfelagnum.

Tað er tí neyðugt, at skúlarnir í undirvísingini taka hædd fyri hesum og næmingalaga móðurmálsundirvísingina soleiðis, at allir næmingar hava møguleika at ogna sær teir lesi- og skriviførleikar, sum eru neyðugir til tess at klára tær útbúgvingarligu- og persónligu avbjóðingarnar, sum liggja fyri framman, bæði tá talan er um at útbúgva seg víðari og í samfelagnum sum heild.

# Støddfrøði

Endamálið fyri lærugreinina

Undirvísingin í lærugreinini hevur til endamáls

- at næmingurin fær eina skipaða fatan av umheiminum og av grundleggjandi støddfrøðiligum høpi, so at hann verður førur fyri at sanna, orða og loysa støddfrøðiligar spurningar, og
- at næmingurin fær vitan um støddfrøðilig hugtøk, talfatan og fimi í talviðgerð og at geva næminginum innlit í grundleggjandi evni og hættir í lærugreinini

## Ávegis mál í 4. flokki

Tøl og rokning við teljitølum (N): Samløga; frádráttur; falding og sundurbýting (+ , · , :). Skipanarrelatión (>, <); brothugtakið; geometri: rúmd (sentiterningar); ummál; vídd; spegling; samskapsásar og máting. Krossskipan; hagfrøði; líkningar; orða støddfrøðiligar uppgávur; klokkan; álmanakkin; keypa-prísir.

## Ávegis mál í 6. flokki

Tøl og rokning við rationellum tølum (Q): Samløga, frádráttur, falding (+ , -, ·) eisini við desimaltølum. Sundurbýting (:); rokning við brotum (+, -, ·) og %; umrokning millum mátieindir: l c – dl, m – cm, kg – g; geometri: vídd og rúmd av einføldum skapum; lesa úr talvum; lesa farmynd; linjufunktión í krossskipan og annars framhald av evnum til 4. flokk.

## Uppgávur í støddfrøði

Uppgávurnar í støddfrøði, bæði í 4. og 6. flokki, vórðu gjørdar samsvarandi ávegis málunum, ið eru nevnd omanfyri.

# Royndarúrslit í støddfrøði

## 4. flokkur

***Talva 6*** **4. flokkur støddfrøði**




***Talva 6a***




*Talva 6 og 6a* vísa yvirlit yvir øll næmingaúrslitini í 4. flokki í støddfrøði. Fult stigatal er 50 stig. Miðalstigatalið fyri alt landið er 42,4 (Í 2009 var tað 42, og í 2008 var miðalstigatalið 40).

Skoðsmálini í *talvu 6a* eru umrokað eftir hesum leisti:

| **Stig** | **Úrslit** |
|---|---|
| 50 – 48 | Sera gott |
| 47 – 40 | Gott |
| 39 – 35 | Yvir miðal |
| 34 – 25 | Miðal |
| 24 – 13 | Undir miðal |
| 12 – 0 | Ikki nøktandi |

# 6. flokkur

***Talva 7*** **6. flokkur støddfrøði**



***Talva 7a***




*Talva 7 og 7a* vísa yvirlit yvir øll nemingaúrslitini í 6. flokki í støddfrøði. Fult stigatal er 100 stig. Miðalstigatalið fyri alt landið er 75,1 stig. (í 2009 var tað 75 stig, og í 2008 var miðalstigatalið 67 stig).

Royndarúrslitini í *talvu 7* eru umroknað eftir hesum leisti:

| **Stig** | **Úrslit** |
|---|---|
| 100 – 95 | Sera gott |
| 94 – 80 | Gott |
| 79 – 70 | Yvir miðal |
| 69 – 50 | Miðal |
| 49 – 25 | Undir miðal |
| 24 - 0 | Ikki nøktandi |

## Viðmerkingar til støddfrøði

Uppgávurnar í støddfrøði bæði í 4. og 6. flokki hava hesi trý árini verið rættiliga líkar, bæði tá ið talan er um innihaldið í mun til evni og torleikastig, og hvussu uppgávurnar eru skipaðar.

Hetta sæst aftur í royndarúrslitunum fyri alt landið, sum vísir eina støðuga framgongd í úrslitinum hjá nemingunum í 4. og 6. flokkunum øll trý árini. Í 4. flokki sæst framgongdin av, at talið av nemingum, sum gerast dugnaligari at loysa uppgávurnar, økist. Talið av nemingum, sum fáa hægri stigatal, veksur, og talið av nemingum, sum liggja *undir miðal*, minkar. Tann størsta framgongdin í landsúrslitinum í 4. flokki er frá 2008 til 2009.

Hetta sama sæst í úrslitunum í 6. flokki, sum vísir eina framgongd frá 2009 til 2010. Hetta sæst í *talvu 7a,* sum vísir, at næmingatalið í bólkinum *sera gott* økist. Í talvunum sæst, at størsta framgongdin í úrtøkuni og royndarfimi næminganna bæði í 4. og 6. flokki er frá 2008 til 2009. Í 2010 er landsúrslitið komið í eina meira fasta legu. Miðalstigatalið í 4. flokki økist við 0,2 stigum og í 6. flokki við 0,1 stigi.

Við støði í hesum kunnu vit staðfesta, at lærarar og næmingar hava tikið landsroyndar-háttin til sín, og at næmingarnir hava lært at ”vera til landsroynd”. Uppgávurnar í royndunum øll árini hava í høvuðsheitum verið minstakrøv og standard uppgávur við einstøkum trupulleikauppgávum, og við hesum í huga kunnu vit staðfesta, at næmingarnir hava klárað at loyst uppgávurnar í støddfrøði á einum nøktandi stigi.

Tá ið vit samanbera býtið í 4. flokki við tað í 6. flokki, serliga við atliti at skoðsmálstalvuna, sæst, at gjøgnum øll trý árini er byrjan til eitt sundurbýti millum næmingarnar. Næmingarnir býta seg í tveir bólkar. Annar bólkurin eyðkennir seg sum ein næmingabólkur, ið er stinnur at rokna uppgávurnar, og hin næmingabólkurin, sum ein bólkur av ”veikum” næmingum, ið ikki klára nóg væl at rokna og loysa uppgávurnar. Hesir næmingar hava ikki skilt og ognað sær neyðugt fimi og førleika at loysa uppgávur innan ávís evni í støddfrøðini.

Tað er tí framhaldandi neyðugt, at lærarar í undirvísingini í støddfrøði eisini eru serliga uppmerksamir upp á henda trupulleikan. Tað verður neyðugt í undirvísingini at taka hond um henda vaksandi bólk av næmingum, sum ikki megnar at loysa uppgávur innan ávís evni. Neyðugt verður at laga undirvísingina í støddfrøði í mun til støðið hjá tí einstaka og geva teimum veikaru næmingunum avbjóðingar, sum styrkja teirra fatan, fimi og førleikar at loysa uppgávur í støddfrøð og samstundis framhaldandi geva teimum stinnaru næmingunum neyðugar avbjóðingar.

# Náttúra og tøkni

Endamálið fyri lærugreinina

Undirvísingin í lærugreinini hevur til endamáls

- at næmingurin við upplivingum og royndum fær innlit í fyribrigdi og samanhang í náttúruni
- at næmingurin fær innlit í, hvussu ymisk tøkni virkar, og lærir at nýta tól og amboð
- at hann víðkar hugsanir, mál og hugtøk, sum hava gerandsligt virði
- at næmingurin við eygleiðingum, kanningum og royndum mennir hegni, skapanarevni og samstarvsevni
- at kveikja gleði næminganna, forvitni og áhugan fyri náttúruni
- at menna áhugan fyri tøkni, lívstreytum og livikorum
- at næmingurin fær almenna vitan í landalæru, lívfrøði og alis-og evnafrøði
- at hjálpa næmingunum at fata samanspælið millum menniskjað og náttúruna úti og heima
- í huga og verki at menna ábyrgdina fyri náttúruni

## Ávegis mál í 4. flokki

Undirvísingin skal miða ímóti, at næmingar hava ognað sær kunnleika og fimi, sum ger teir førar fyri

- at lýsa fyribrigdi sum ljós, ljóð og rørslu
- at lýsa gerandislig viðurskifti innan tøkni, sum el og magnet
- at greiða frá lufttrýsti
- at greiða frá plantum og dýrum og teirra liviumstøðum
- at greiða frá vatnringrás og vatnnýtslu
- at greiða frá vanligastu fiskasløgunum undir Føroyum og teirra liviumstøðum
- at lýsa nøkur fuglasløg, føði og tilhald
- at greiða frá sansunum
- at duga oyggjarnar í Føroyum, hægstu fjøll og nakrar býir/bygdir
- at kenna norðurlond, høvuðsstaðir og fløgg
- at kenna ættirnar og duga at brúka kumpass
- at greiða frá um sólskipanina og sambandinum millum mánan, jørðina og sólina

## Ávegis mál í 6. flokki

Undirvísingin skal miða ímóti, at næmingar hava ognað sær kunnleika og fimi, sum ger teir førar fyri at

- lýsa uppruna Føroya
- duga heimspartar, heimshøv og havstreymar
- greiða frá, hvussu náttúruvanlukkur ávirka liviumstøður hjá fólki og dýrum
- greiða frá sólskipanini og seta hana í samband við árstíðir, flóð og fjøru
- lýsa veðurlagsbelti
- kenna høvuðstættirnar í okkara fiskivinnu, veiðireiðskap og skipasløg
- greina liviumstøður hjá plantum og dýrum, vistskipanir og føðiketur
- kenna vanligastu fuglasløgini í Føroyum
- kenna vanligastu fiskasløgini í Føroyum
- kenna vanligastu dýrasløgini í Føroyum
- greiða frá høvuðs kropsgøgnum hjá fólki og teirra týdningi
- lýsa, hvussu matur og rørsla ávirka okkum
- greiða frá og duga hugtøk um streymnýtslu, streymkeldur, javnstreym og vendistreym
- lýsa, hvussu tøkni og dálking kunnu ávirka lívskorini hjá plantum, dýrum og menniskjum
- læra og nýta náttúruvísindaligt arbeiðslag við atliti at spurdómum, fyrireika og gera kanningar og samanbera kanningarúrslit
- læra at velja og nýta viðkomandi amboð og tól í kanningararbeiðnum, t.d. stereoluppar og indikatorar
- leggja fram kanningarúrslit og nýta ymiskar framløguhættir, sum grafar, tekstir, fyrilestur og drama

# Uppgávur í náttúru og tøkni

## 4. flokkur

Uppgávurnar í landsroyndini í 4. flokki í 2010 fevndu um hesi evni:

- Magnet
- El-læra
- Dýr í fjøruni
- Smákykt
- Fuglasløg í Føroyum
- Norðurlond, høvuðsstaðir, lond og fløgg
- Oyggjarnar í Føroyum

## 6. flokkur

Uppgávurnar í landsroyndini í 6. flokki í 2010 fevndu um hesi evni:

- Ættir
- Sólskipan
- Fiskar
- Plantur
- Matur
- Mannakroppur
- Jarðfrøði

# Royndarúrslit í náttúru og tøkni
## 4. flokkur

***Talva 8a***




***Talva 8b***




*Talva 8a og 8b* vísa yvirlit yvir næmingaúrslitini í 4. flokki í náttúru og tøkni.
Hægsta stigatalið er 6 stig. Miðalstigatalið fyri alt landið í 2010 er 4,8. (Í 2009 var miðalstigatalið 4,44 og í 2008 4,14).

***Talva 9***




*Talva 9* vísir yvirlit yvir úrslit innan ávís evni, sum hava verið í uppgávunum øll árini, og sum tí  kunnu samanberast.

# 6. flokkur

***Talva 10a***




***Talva 10b***




*Talva 10a og 10b* vísa yvirlit yvir næmingaúrslitini í 6. flokki í náttúru og tøkni. Fult stigatal er 6. Miðalstigatalið fyri alt landið í 2010 er 4,34 (í 2009 var miðalstigatalið 3,81 og í 2008 2,78).

***Talva 11***




*Talva 11* vísir yvirlit yvir úrslit innan ávís evni, sum hava verið í uppgávunum øll árini, og sum tí kunnu samanberast.

# Viðmerkingar til náttúru og tøkni

Talvurnar í náttúru og tøkni vísa, at næmingarnir bæði í 4. og 6. flokkunum sum heild hava klárað uppgávurnar í náttúru og tøkni væl. Ein støðug framgongd hevur verið í úrslitunum hjá næmingunum øll trý árini.

## 4. flokkur

Úrslitið vísir, at 4. flokkur kláraði seg væl í royndini. Miðalstigatalið fyri alt landið í 2010 er 4,8 av 6 møguligum. Hetta er ein framgongd uppá 0,36 stig í mun til 2009. Orsøkirnar til framgongdina kunnu verða mangar, men vísast kann í hesum sambandi m.a. á, at:

- Náttúra og tøkni er áhugaverd lærugrein, tí hon kann fevna víða
- Uppgávurnar eru viðkomandi og hava lættan lesitekst við nógvum myndum
- Lærarin hevur neyðugan førleika
- Næmingarnir hava ivaleyst arbeitt við líknandi uppgávum frammanundan

## 6. flokkur

Úrslitið vísir, at í mun til undanfarnu ár hava næmingarnir í 6. flokki megnað uppgávuna væl. Miðalstigatalið er hækkað úr 3,81 í 2009 til 4,34 í 2010, so her er ávís framgongd.

Orsøkirnar til framgongdina kunnu verða fleiri og í hesum sambandi kann verða víst á, at :

- Næmingarnir í stóran mun hava skilt uppgávurnar, og hava ognað sær betri førleika at loysa uppgávurnar
- Hava givið sær tíð at grunda yvir uppgávuna
- Næmingarnir hava fingið ávísa venjing í at loysa líknandi uppgávur
- Lærarin hevur kanska í undirvísingini lagt størri dent á at loysa og viðgera uppgávur

Vansin við landsroynd í náttúruvísindaligu lærugreinunum kann vera, at lærarin fer at leggja størri dent á at venja næmingin til royndina og harvið minka um fakligar upplivingar, eygleiðingar o.a., sum kunnu vera torførar at meta um í eini landsroynd. Hesin vansin átti at verið minni, nú landsroyndin er løgd í mars mánað, tí nú hevur lærarin møguleika at nýta bæði heystið og várið til verkligt arbeiði og kanningar uttandura. Várið og heystið eru bestu árstíðir at arbeiða við lívrunnum tilfari bæði tí, sum grør og livir í náttúruni.

Samanumtikið kann staðfestast, at landsúrslitið *í náttúru og tøkni* í 2010 bæði í 4. og 6. flokkunum er gott og er støðugt batnað í mun til 2008 og 2009.

Neyðugt verður tó framhaldandi at hava fyri eyga, at *náttúra og tøkni* er lærugrein, har upplivingar, eygleiðingar og kanningar er aðaltátturin í lærugreinini. Hetta eiga lærarar, sum undirvísa, at taka atlit til, men ástøðiligi parturin eigur tó ikki at vera undirmettur. Undirvísingin eigur javnan at verða eftirmett og støðuroyndir gjørdar, sum geva læraranum neyðugt innlit í, um endamálið er rokkið, og um næmingarnir hava nomið sær vitan, kunnleika og fatan, sum miðað var ímóti. Við støði í hesum eftirmetingum skal lærarin tillaga undirvísingina í mun til fortreytir, evni og vitanarstøðið hjá tí einstaka næminginum.

# Miðalúrslitið fyri alt landið

## Yvirlit yvir miðaltøl fyri alt landið í landsroyndini

## 2008, 2009 og 2010

*Talva 12*

| Lærugrein | 2008 | 2009 | 2010 | 2008 | 2009 | 2010 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| | 4.flokkur | | | 6.flokkur | | |
| Føroyskt Lesa og skilja | 3,53 | 4,06 | 3,57 | 4,00 | 4,89 | 4,43 |
| Føroyskt Fyrisøgn | 4,93 | 4,23 | 4,64 | 4,78 | 4,89 | 4,86 |
| Føroyskt Málllæra | | | | 3,49 | 4,36 | 4,39 |
| Støddfrøði | 4,48 | 4,76 | 4,85 | 3,63 | 4,12 | 4,16 |
| Náttúra og tøkni | 4,14 | 4,44 | 4,85 | 2,78 | 3,81 | 4,16 |

Talvan niðanfyri vísir stigabýtið, sum skoðsmálini, ið næmingarnir fáa fyri avrikið, er grundað á.

## Stigatalva

*Talva 13*

| Talmet | Úrslit | Stigabýtið sum skoðsmálini byggja á |
|---|---|---|
| **6** | Sera gott | ≥95% |
| **5** | Gott | 80% ≥ 94% |
| **4** | Yvir miðal | 70% ≥ 79% |
| **3** | Miðal | 50 ≥ 69% |
| **2** | Undir miðal | 25% ≥ 49% |
| **1** | Ikki nøktandi | 24% ella minni |

Landsroyndin 2010

Frágreiðing um mál, ávegis mál, uppgávur og úrslit